J.nr.: F.K. 00-04-
Dato: 02. mars 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# F U N D A R F R Á S Ø G N

**frá býráðsfundi nr. 03/2006**

Ár 2006 tann 02. mars kl. 19.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 01. mars 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen
Petur Abrahamsen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

## Mál nr. 13/2006.

**Mál viðvíkjandi havnabygging á Enninum.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið tilmæli frá havnanevndini frá 09. februar 2006 um ætlaða útbygging av Fuglafjarðar havn, sum nevndin eisini viðgjørdi á fundi tann 07. februar 2006.

Greitt verður frá, at nevndin hevur móttikið upplýsningar frá fyrisitingini um fíggjarligar avleiðingar av øktari lánbyrðu upp á ávikavist 20,0 og 34,0 mió. kr. Um talan verður um økta lánbyrðu upp á kr. 34,0 mió, so krevst loyvi frá landsstýrismanninum í Innlendismálum, hetta sambært § í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Havnanevndin mælir annars til á fundinum 09. februar 2006, at nevndin heldur fast við niðurstøðuna á fundinum 07. februar 2006 og mælir býráðnum til at leingja Ennibryggjuna umleið 100 metrar heimeftir, somuleiðis sum víst verður til ódagfest skriv frá havnameistaranum um hesi viðurskifti.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 15. februar 2006, og hevur á fundinum viðgjørt møguleikarnar fyri útbygging av havnini við m.a. atliti til bæði fíggjarliga partin og viðurskiftini hjá skipum, sum bæði koma við tungolju-fuelolju og eisini skip, ið hava beinleiðis samband við frystigoymslur, fóðurgoymslu, sand- og rallgoymslu o.a.

Ì sambandi við prinsipployvi, sum býráðið á fundi tann 12. juli 2005 hevur givið stigtakarunum til tungoljuprojektið, kunngjørt við skrivi, dagfestum 19. august 2006, so varð tá roknað við, at ein bryggja varð gjørd fram við økinum niðanfyri

hesar tangar, somuleiðis sum kommunan í 2006 skal fáa til vega niðanfyri standandi fígging:

| | Navn á íløgu: | Møguligt m3 | Kostnaður: | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Egningarmiðstøð | | 2,5 mió | |
| 2 | Grótkeyp Vónin-tunnil | 50.000 | 5,0 mió | |
| 3 | Spreingjan ben á Enninum | | 2,0 mió. | |
| 4 | - Grótsøla havnabygging | | 2,0 mió. | |
| | Útreiðslur íalt: | | **7,5 mió.** | |

Havandi í huga, at ætlanin er at nýta kr. 20,0 mió. til havnabygging tilsamans, so verður mett, at kr. 12,5 mió. eru eftir til gerð av atløgusíðu. Sambært metingina verður kostnaðurin av 70 metrar atløgusíðu kr. 14,0 mió. (uppskot I fyrsta byggistig), so út frá omanfyri standandi tølum verður helst talan um eina atløgusíðu upp á umleið max. 63 metrar.

Um ein atløgusíða við eini longd upp á 100 metrar sambært uppskoti 1 (tilmæli frá havnanevndini) 2. byggistig skal verða framd í 2006, so verður ikki bert talan um ein kostnað upp á kr. 20,0 mió, men skulu í minsta lagi kr. 7,5 mió verða lagdar aftrat sambært omanfyri standandi meting, og tá verður talan um eina lántøku upp á í minsta lagi kr. 27,5 mió.

Fíggjarliga støða kommununar verður tá, um henda ætlan verður gjørd, at lánbyrða kommununar verður økt úr kr. 21.917.766,19 upp í kr. 49.417.766,19 brutto. Tá eru avdráttir av lánum í 2006 upp á kr. 5,080 mió. tiknir við. Um innistandandi peningur upp á kr. 9.296.144,73 (tøkur ídag), so verður talan um eina nettoskuld upp á kr. 40.121.621,46.

Tá ein álíkning (A+B skattur) við 23%-um verður mett at geva kommununi kr. 43.700.000,00, so verður talan um eina skuld svarandi til 0,92 av eini álíkning, so komið heilt upp móti eini álíkning netto í skuld, har kommunan í hvørjum einstøkum føri skal søkja landsstýrismannin í Innlendismálum um neyðug loyvi til lántøku, áðrenn hesi verða upptikin. Tá er frælsið kommununar nærum burtur á fíggjarliga økinum, tá m.a. eitt nú fíggjarætlanir skulu verða góðkendar og ikki bert kunnaðar.

Um talan verður um lántøku upp á kr. 20,0 mió. tilsamans til serstaka oljubryggju á Enninum, keyp av gróti frá Vónini, spreinging av lendinum til tangarnar, og sølu av gróti til havnabyggingina, so verður lánbyrða kommununar økt úr 21.917.766,19 upp í kr. 41.917.766,19 brutto. Tá eru avdráttir av lánum í 2006 upp kr. kr. 5,080 mió tiknar við.

Um innistandandi peningur upp á kr. 9.296.144,73 verður frátrektur, so verður talan um eina nettoskuld upp á kr. 32.621.621,46, svarandi til eina netoskuld við 23%-um upp á slakar 0,75 ferðir eina álíkning.

Sambært tilmælinum frá havnanevndini, so skal øll upp- og avskiping av olju verða framd yvir verandi bryggju + teir 100 metrarnar heimeftir ella á 152 metra bryggjulongd. Tá roknað verður við, at eini 100.000 tons av tungolju framyvir koma at verða upp og avskipað, somuleiðis sum frystivørur bæði skulu verða upp- og avskipað yvir eina bryggju, so verður roknað við sum givið, at mangan verða skip noydd at bíða á fjørðinum ella við aðrar bryggjukantar fyri at sleppa framat.

Tílík viðurskifti metir nevndin verða sera óheppin, tá skip av tílíkum støddum, sum koma til og frá bryggjunum á Enninum, kosta nógv í rakstri og kapitalútreiðslum hvønn einasta dag, og tessvegna ikki kunnu liggja fleiri dagar

og bíða eftir at sleppa av við ella koma eftirvøru. Tað verið seg bæði olju og frystivørum.

Sambært upplýsningum frá felagnum undir stovnan, so verður upplýst, at miðað verður fram ímóti, at uppskipaða nøgdin í meðal verður 110.000 tons, meðan avskipaða nøgdin verður 95.000 tons, tá P/F Havsbrún kemur at nýta 15.000 tons.

***Tangaskip***, oð koma við olju lasta millum 8.000 og 15.000 tons, og eru tey í longd millum 120-160 metrar,

***Skip, ið koma eftir olju***, taka í meðal 300 tons hvørja ferð, og er longdin av hesum skipum millum 50 og 170 metrar (eimskip/norrøna).

***Mettar vitjanir***: Tangabátar 12 ferðir um árið, sum liggja í meðal 2 dagar hvørja ferð.

***Atløgutørvur:*** 95.000 tons:300 tons í meðal pr. skip = 317 ferðir + tangaskip 12 ferðir - samantals 329 skip leggja til um árið, svarandi til umleið 1 skip dagliga.

Fyribils inntøkur av gjøldum til Fuglafjarðar havn á hesum grundarlagi verða leystliga mettar til kr. 1,5 mió.

Nevndin er av teirri sannføring, at besta loysnin er í fyrstu atløgu at gera eina oljubryggju á enninum niðan fyri komandi tungoljutangar við eini longd upp á max. 70 metrar, og kunnu oljuskip tá leggja beinleiðis at oljubryggju, meðan skip við frystivørum kunnu verða avgreidd yvir verandi bryggju niðan fyri Bergfrost og tunnlarnar.

Sum annað byggistig eigur henda at verða longd, tá fíggjarligarn umstøður eru til tað.

***Tilmæli frá havnanevndini:***

Havnanevndin hevur havt málið um havnabygging til viðgerðar á fundi tann 09. februar 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at hildið verður fast um niðurstøðuna hjá havnanevndini á fundi 7. februar 2006, har mælt verður býráðnum til at leingja Ennibryggjuna umleið 100 metrar heimeftir, og vísir til skriv frá havnameistaranum hesum viðvíkjandi.

***Tilmæli frá fíggjarnevndini:***

Nevndin er samd við havnanevndini um, at nýttar eiga at verða í mesta lagi kr. 20,0 mió. til útbygging av Fuglafjarðar havn í 2006. Hinvegin mælir nevndin einmælt býráðnum til, at sjálvstøðug oljubryggja upp á max. 63 metrar verður bygd á økinum niðan fyri komandi tungoljutangar sambært uppskoti nr. I frá teknisku deild kommununar við einum max. kostnaði upp á kr. 12,5 mió. Grundgevingin er, at nevndin metir stóra skipaferðslu á økinum, og skipini kunnu best og skjótast verða avgreidd við 2 bryggjum, einari til olju og eini til frystivøruro.a.

Hinvegin skal fíggjarnevndin taka atlit til fíggjarligu viðurskifti kommununar, og grundað á fíggjarligu útgreiningarnar av støðu kommununar við árslok 2006, so verður ikki møguleiki fyri at gera størri íløgu í havnina enn kr. 20,0 mió, tá kommunan í komandi árum stendur fyri stórum nýíløgum á fleiri økjum, og sum koma at verða fíggjaðar yvir kommunala raksturin og møguliga partvíst við lántøku.

Annars er nevndin av teirri sannføring, at havnabyggingin ikki á nakran hátt skal koma at ávirka kommunuskattaprosentið, men at íløgan framyvir skal verða rindað av øktum havna-brúgva-vatn- vøru og leigugjøldum.

Nevndin mælir somuleiðis til, at býráðið gevur býrásleiðsluni heimild til at taka upp samráðingar við fíggjarstovnar um lántøku upp á tilsamans kr. 17,5 mió. til havnabyggingina, spreinging og grótkeyp, meðan heimild at taka kr. 2,5 mió. í láni til egningarmiðstøðina er veitt av býráðnum í sambandi við góðkenning av fíggjarætlan kommununar fyri 2006.

Á býráðsfundi tann 23. februar 2006 varð samtykt eftir uppskoti frá Signari á Brúnni, havnanevndarformanni at beina málið aftur í havnanevndina til viðgerðar. Málið verður lagt fyri eykabýráðsfund hósdagin tann 2. mars 2006 kl. 19.00.

***Tilmæli frá havnanevndini frá 28. februar 2006:***

23 február 2006 varð málið um útbygging av havnalagnum til viðgerðar á býráðsfundi.
Limirnir í havnanevndini mæltu til, at málið fór aftur í Havnanevndina, tí m.a. nýggir upplýsingar lógu í álitinum frá fíggjarnevndini, ið limirnir í Havnanevndini ikki vóru kunnaðir um.
Eftir nakað av umrøðu fór málið aftur í Havnanevndina.
Havnanevndin hevur givið málinum eina gjølliga viðgerð á fundum 7., 9. og 27. február 2006.
Í tí fyrra álitinum, ið varð lagt fyri býráðið, mælti ein samd havnanevnd til, at bygt varð frá Ennibryggjuni og 100 metrar heimeftir, so samlaða atløgubryggjan bleiv 158 m long, ið skapar góðar umstøður at veita góða tænastu til stór framtíðarskip.
Undir nevndarviðgerðini hevði Havnanevndin vent sær til havnameistaran og havnafútarnar, ið munnu verða teir, ið eru best fyri at taka dagar ímillum, hvør loysn er tann besta. Teirra støða er púra greið,
Teir siga m.a. soleiðis: At gera eina tungoljubryggju sunnanfyri núverandi Bergfrostbryggju, er sjálvandi ein møguleiki, men tann bryggjan verður ikki nóg mikið nýtt av skipum, í mun til ta íløguna, sum tað kostar at byggja hesa.
Tað er sera strævið at taka í móti stórum skipum til hesar molar, tí endarnir mugu verða langir inn á land bæði aftan og framman til at festa við.
Annað sum eisini ger seg galdandi er, at um vit skulu ímynda okkum at fáa fleiri útlendsk skip at koma inn her, so eru skiparnir ikki so glaðir fyri hesar stuttu molar.
Hetta krevst so eisini, at um satsa verður upp á hesar molar, so mugu vit útvega okkum 2 sleipi- trýsti bátar fyri at leggja hesi skip til bryggju.

Við hesum brotum, hava vit drigið fram, hvat teir, ið starvast á havnaøkinum, havnameistari/havnafútar og skiparar, halda um nevndu viðurskiftir.
Á seinasta fundi í havnanevndini, t.e. 27. február, varð staðfest, at eingin vissa er um ætlaðu tunnilsgerðina hjá Vónini. Næsti fundur við kommununa um møguligu ætlanir, verður 17. mars 2006.
Heldur ikki er svar komið frá Yvirfriðingarnevndini, um økið, har ætlanir eru at seta oljutangarnar.
Um bygt verður 100 metrar, soleiðis sum ein samd havnanevnd mælti til í fyrra álitinum, so verður kostnaðurin í mesta lagi 20 mió. kr.

**Meiriutin** hesaferð **Tórfríður Abrahamsen og Signar á Brúnni** halda hetta verða skilabestu loysnina, tó við tí ískoyti, at aftratbyggingin í mesta lagi, verður 100 metrar.

Umstøðurnar til at upp- og avskipa olju eru minst líka góðar sum við eini serstakari nýggjari oljubryggju á Enni. Og umstøðurnar hjá frysti- og farmaskipum er munandi betri enn við verandi Ennibryggju 2 skip størri enn 100 m hvørt liggja væl her samstundis.
Møgulig bíðitíð verður ikki størri við uppskotinum hjá meirlutanum í Havnanevndini, heldur tvørtur ímóti.

Vísandi til kunngerð frá 1913, ið býráðslimirnir hava fingið frá umsitingini, so skulu allar inntøkur frá havnini verða nýttar til rakstur og útbygging av Fuglafjarðar havn. Vísandi til hetta verður mett, saman við inntøkuvøkstri mett av fíggjarnevndini upp á 1,5 mió. kr., at inntøkan hjá Fuglafjarðar havn í 2007 verður umleið 7 mió. kr. Og útreiðslurnar 2,7 mió. kr. T.e. eitt avlop upp á 4,3 mió. kr.
Somuleiðis heldur meirlutin, at tað hevði verið skilagott, at dagført havna/brúgva gjøldini, so inntøkurnar til havnina, gjørdust uppaftur størri, so møguleikarnir at gjalda lánini aftur, ið verða tikin til havnabygging, verða so skjótt sum møguligt goldin aftur.

Út frá tí, sum her er ført fram, er havnin einsamøll før fyri at fara undir ta størru útbyggingina upp á 100 m (i mesta lagi) við somu afturgjaldingartíð.
Sambært tølum frá fíggjarumsitingini verður gjaldið við hvørt á, av einum láni upp á 20 mió. yvir 10 ár, kr. 2,6 mió. kr.
Vísandi til tað, ið fíggjarnevndin hevur borið fram, verða inntøkurnar av oljuhavnini, økt umleið 1,5 mió. kr. Verða havna- og bryggjugjøldini hækkað, so tey geva 1 mió. kr., ið ikki er høgt sett, so svarar tað til útreiðslurnar, ið standast av havnabyggingini.

Meirlutin **Tórfríður Abrahamsen og Signar á Brúnni** halda fast við tað uppskot, ið ein samd havnanevnd legði fram á fyrsta sinni, um at leingja Ennibryggjuna heimeftir við umleið 100 m. Í mesta lagi.

Minnilutin **Dánjal Vang** mælir til, at nýggj serstøk oljubnryggja upp á í mesta lagi 70 metrar verður gjørd norðuri á Enni, niðan fyri komandi oljutangar við einum max kostnaði upp á 12,5 mió. kr.

Vísandi til áheitan frá havannevndini til teknisku deild kommununar 28. februar 2006, so metir deildin í skrivi, dagfestum 01. mars 2006, at kostnaðurin av at leingja nnibryggjuna heimeftir við 100 metrum verður mett til kr. 20,0 mió. Verður ætlaði tunnilin til P/F Vónina gjørdur, so verður mett, at havnin keypir umleið 63.000 m2 av gróti, og verður kostnaðurin av hesum mettur til kr. 6,3 mió.

Verður tunnilsarbeiðið gjørt samstundis sum havnabyggingin, verður mett, at umleið 15.000 m3 av hesum tunnilsgróti verður nýtt til havnabyggingina. Verður hetta mótroknað verður úrslitið hetta:

| | **Navn á íløgu:** | **Møguligt m3** | **Kostnaður:** | **Viðmerkingar:** |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Ennibryggja 100 metrar | | 20,0 mió. | |
| 2 | Ennibryggja keyp grót Vónin | 15.000 | 1,5 mió. | Íroknað kostnað |
| 3 | Vónatunnilin | 48.000 | 4,8 mió. | |
| 4 | Egningarmiðstøðin | | 2,5 mió. | |
| | Samlaður kostnaður | | **27,3 mió.** | Postar 1,3 og 4 |
| | Kostnaður uttan Vónatunnil | | **22,5 mió.** | Postar 1 og 4 |

**Avgerð:**

Broytingaruppskot frá Jón Nolsøe Olsen, dagfest 02. mars 2006 varð sett fram á býráðsfundinum. Uppskotið er hetta: "Bygging av oljukei". Sum eitt kompromis til hesi 2 hjáløgdu uppskotini mælir undirritaði til, at um ikki verður bygt uppm í bergfrostkeiina og heimeftir, at so ístaðin ein bryggja verður gjørd millum Bergfrostkeiina og Havsbrúnkeiina, longdin skal verða, sum peningur røkkur til. Hetta hevur so við sær, at byrjað verður upp á samanbyggingina av hesum báðum bryggjunum, so vit fáa eina góða, langa bryggju einaferð í framtíðiini."

Broytingaruppskotið fall. (2 atkv. Fyri, 4 atkv. Ímóti og 3. atkvøður vórðu blankar. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Dánjal Vang, Jann Toftegaard og Tórfríður Abrahamsen. Blankt atkvøddu. Elisabeth D. Eldevig, Signar á Brúnni og Eyðun á Lakjuni).

Síðan varð atkvøtt um minnilutauppskotið hjá Dánjali Vang í havnanevndini. Uppskotið varð samtykt við 5 atkv. fyri, 3. ímóti og einari blankari. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni, Tórfríður Abrahamsen og Jón Nolsøe Olsen. Blankt atkvøddi Petur Abrahamsen.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21⁰⁰

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Signar á Brúnni

Elisaberh D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Tórfríður Abrahamsen

Jón Nolsøe Olsen

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen